## Lítið kyksilvur á Svalbard



Fleiri norskir granskarar hava stúrt fyri, at tann skjótt veksandi orkunýtslan í Asia kann elva til størri kyksilvurdálking á eitt nú Svalbard, men nú vísa kanningar hjá Norsk Polarinstitutt, at har er lítið kyksilvur. Síðani 1995 hava granskarar kannað innihaldið í plankton, toski, lodnu, æðu og øðrum fugli við Svalbard, men sambært kanningunum er ikki meiri kyksilvur í hesum royndum enn royndum, sum eru tiknar aðrastaðni á norðaru jarðarhálvu, skrivar Norsk Polarinstitutt í einari nýggjari frágreiðing.

## Sendið tilfar til Vencil 6

Sætta útgávan av skaldskaparritinum Vencil er nú í gerð, og freistin at lata inn tilfar er 1. mars 2009. Hesa ferð heita ritstjórarnir á høvundarnar um at royna at skriva stuttsøgur og yrkingar, sum onkursvegna endurspegla nútíðar samfelagið, soleiðis sum høvundurin sjálvur sær tað. Serliga vilja teir hava lýst stríðið um virði og ráðandi heimsmyndir, sum vit dagliga hoyra um í fjølmiðlunum, herundir hvussu nýggja samskiftistøknin ávirkar hetta stríð. Vencil vil við hesum hava fram ymsar fatanir og tulkingar av leikluti okkara í hesum altjóða leiki, bæði sum einstaklingar og sum tjóð. Sendið tilfarið til vencil@vencil.fo

## Hópuppsagnir í byggivinnuni

**Tað er ikki bara Articon, ið hevur sagt fólki upp í verandi ári av keðiligu útlitunum í byggivinnuni. Allar fyritøkurnar, ið Sosialurin hevur tosað við, hava sagt fólki upp. Í einum stað eru fimm av 17 uppsøgd í seinastu viku**

**UPPSAGNIR**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Viking smíð, segði í seinastu viku fimm av 17 fólkum upp. Hetta er næstan ein triðingur av øllum í fyritøkuni.

Articon, sum er nevnt í grein á hesi síðu segði 25 fólkum upp. J & K Petersen hava fyribils sagt trimum fólkum upp, men vita ikki, hvat er í væntu. Umframt at teir hava nýtt undirveitarar, sum natúrliga eru farnir úr starvi, tá arbeiðini hava verið liðug. Norðhús hava eisini sagt onkrum manni upp.

Tískil er líkt til, at henda gongd er galdandi fyri alla føroyska byggivinnu. Tað eru serliga Íslendingar, ið fáa arbeiðini, sum tað almenna bjóðar út, tí teir hava hópin lægri lønir.

Í seinastu viku greiddi politiska skipanin frá, at hetta er ein fylgja av Íslandssáttmálanum, men at tað mugu verða marknaðarkreftirnar, ið ráða.

# Fjórði hvør uppsagdur hjá Articon



*Reisugildir, fløgg og so framvegis eru vorðin færri hjá Articon. Hetta hevur havt stórar skerjingar við sær. Hesar hava viðført, at ein av hvørjum fýra er uppsagdur*

**Av teimum 100 fólkunum, ið seinastu árini hava verið í starvi hjá Articon úti á byggiplássunum, vóru 25 í vikuni søgd upp**

**UPPSAGNIR**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

25 fólk vóru í gjár og í fyrradagin søgd upp hjá byggifyritøkuni Articon. Øll tey uppsøgdu eru fólk, sum hava arbeitt úti á byggiplássunum. Talan er sostatt um handverkarar, bilførarar og so framvegis.

- Tað er stuttligari at seta fólk, enn at siga teimum upp, men mann má fyrihalda seg til veruleikan, sum hann nú einaferð er, sigur Niklas Joensen, fíggjarstjóri.

Aðrar byggifyritøkur hava somuleiðis sagt fólki upp, hóast tølini ikki eru eins stór hjá øllum.

- Tað er líka frá tí størsta til tann minsta, sum er banghin í fyri, hvat fer at henda í byggivinnuni nú, staðfestir Steinolvur Petersen, stjóri í J & K Petersen. J & K hava sagt trimum monnum upp. Men sambært stjóranum kemst hetta fyrst og fremst av, at teir ikki hava nýtt so nógv fólk, men heldur nýtt undirveitarar, sum natúrliga eru farnir úr starvi.

### Politikararnir sova

Føroysku byggifyritøkurnar eru á einum máli um, at ein av høvuðsorsøkunum til tunga sjógvin er, at tær ongan møguleika hava at kappast við íslendskar fyritøkur um almennu íløgurnar, ið samgongan hevur prioritera høgt í hesum tíðum, fyri at halda virksemi í gongd í landinum.

- Mann prioriterar almennar íløgur, men bjóðar samstundis øllum til lisitatión. Hetta ger at vit koma í eina ójavna kapping við íslendingar, sum altíð kunnu undirbjóða okkum, tí lønarlagið er so lágt hjá teimum í løtuni, vísir Niklas Joensen á.

Steinolvur Petersen, stjóri á J & K Petersen, greiðir somuleiðis frá, at hetta er ein stak óheppin støða fyri føroyska byggivinnu.

- Tað vísir seg sum, at politikararnir sova. Enn er lítið undirskrivað, men tá tað hendir verður ov seint at gera nakað, sigur Steinolvur Petersen. Hann leggur afturat, at hetta enntá kann enda við, at føroyskar fyritøkur seta íslendingar í starv heldur enn føroyingar, fyri at hava eina javnbjóðis kapping. Eftir hansara tykki er heldur onki land í heiminum, sum hevur vunnið nakað serligt við at innflyta bíliga arbeiðsmegi til landið. Tískil metir hann, at henda støða fer at býta okkum aftur í halan. Onnur fyritøka vísir á, at henda støða somuleiðis fer at hava fráflyting við sær.

### Kapping um løn

Í løtuni kostar íslendsk arbeiðsmegi hópin minni enn føroysk, og hetta er sambært føroysku byggifyritøkunum einasti munurin.

- Vit hava altíð klárað at kappast við íslendingar. Tólini kosta tað sama og tilfarið kostar tað sama. Veruligi munurin er í arbeiðsmegini, har tveir íslendingar kosta tað sama sum ein føroyingur, sigur Steinolvur Petersen.

### Skuldi broytt lisitatiónirar

Niklas Joensen, fíggjarstjóri í Articon, vísir á, at heilt fáa lisistatiónir eru í løtuni, og at tað almenna tískil burdi gjørt okkurt, fyri at betra um møguleikarnar hjá føroyskum fyritøkum, fyri at halda peningin í landinum.

- Teir kundu broytt lisitatiónirnar, soleiðis, at teir bert bjóðaðu føroyskum fyritøkum at koma við tilboðum, tí hørð kapping hevur verið millum føroyingar alla tíðina, skjýtur Niklas Joensen upp.

Allar byggifyritøkurnar, ið Sosialurin hevur tosað við, eru á einum máli um, at heldur verandi gongd fram, so verða enn fleiri uppsagnir hjá føroyskum byggifyritøkum í komandi tíðum, ið mann kundi sloppið undan, um tað almenna nýtti føroyingar til ymisku íløgurnar.

Tvey dømi, har útlendingar hava fingið almenn arbeiðir, eru Hovstunnilin, skúladepilin í Suðuroy og fyrsta byggistig av útbyggingini á Landssjúkrahúsinum.